# Spurningar og svar í sambandi við útboð av Talgildum Samleika

Í sambandi við útboðið av Talgildum Samleika verða her svaraðir innkomnir spurningar frá veitarum um útbjóðingartilfarið, ið bleiv almannakunngjørt tann 28. mars.

Spurningar kunnu stílast til Rolf Herup Olsen, verkætlanarleiðara, á e-post: rolf@talgildu.fo.

Svar verða løgd dulnevnd út á hesa síðu.

| Dato móttikið | Spurningur | Svar |
|---|---|---|
| 6.4.2017 | Útgreina Trust Service Provider (TSP) setup. Hvat væntast av veitaranum, mannagongdir v.m.? | - Tað verður ikki uppgávan hjá veitaranum at vera TSP. Tó skal loysnin liva upp til krøvini frá eIDAS, so Gjaldstovan kann blíva TSP<br>- Tað er ikki partur av hesum útboðnum, at Gjaldstovan kvalifiserast sum TSP<br>- Veitarin skal gera eina loysn og applikatiónir til sjálvsgreiðslu og administratión sum loyvir Gjaldstovuni at gerast TSP, m.a. við atliti til rollubaseraði krøv (RA/CA) til applikatiónir |
| 6.4.2017 | Í sambandi omanfyristandandi spurning: skal veitarin hava nakrar tekniskar førleikar í samband við at Gjaldstovan gerst TSP? | - Gjaldstovan hevur sett krøv til support og viðlíkahald í útboðstilfarinum. Tað ið ikki stendur har, er ikki í scope, og tí vil talan vera um change request. |
| 6.4.2017 | Viðv. Integratiónum til FÓLK og Vinnuskránna (TAKS); um tær ikki eru klárar til tíðina, hvør hevur so ábyrgdina av seinkingum? | - Veitarin hevur einans ábyrgd av markamótum í Talgildu Samleika loysnini, og ikki tað sum skal mennast í Vinnuskránni og FOLK-skipanini |
| 6.4.2017 | Vinnuskráin hevur onga Web service sum útstillar dátu; hvussu skal veitarin loysa hetta ísv. at vinnuskrá dátu skulu vera tøk í loysnini? | - Um ongin Web service verður tøk so má ein onnur fyribils loysn finnast, smb. 2a, 4.8.2. |
| 6.4.2017 | Hvat fevnir Løsningsverifikationsfasen um? | - Víst verður til sáttmálan Del II<br>- Endamálið við Løsningsverifikation er at fara djúpari í samskiftinum við tann veitaran, sum sáttmáli er gjørdur við, um valdu loysnina. Tá henda fasan er liðug, fyriliggur endaliga Løsningsbeskrivelse (2c), umframt Skjal 2e, avsnit 3.1, og Skjal 7, krav 7.1. |

| | | |
|---|---|---|
| | | - Í tann mun tað er gjørligt, er tað ynskiligt at ein prototypa er tøk í hesi fasuni, t.d. eitt demo-miljø hjá undirveitara. Tó er hetta ikki eitt krav.<br>- Ætlan fyri tey fyrstu sprint/iteratiónir við teimum fyrstu user-stories skal helst eisini verða upp á pláss. |
| 6.4.2017 | Veitingin av t.d. plastik kortum og sim-kortum. Hvør tekur avgerð um hesar veitingar? | - Um veitarin nýtir hesi elementir í loysnini væntar Gjaldstovan eina veiting sum eisini fevnir um hetta. |
| 6.4.2017 | Orðingin 'Kundin ynskir'/'client wishes'/'Gjaldstovan wishes' verður nevnd fleiri ferðir í 2a og 2b. Hvat merkir tað? | - Slík ynskir eru knýtt at "K"-krøvum (konurrencu-krav) og infokrav (smb. 2bi), sum verða vektaði í kvalitetspartinum av vurderingini. Tvs. hetta er ikki minstukrøv, men krøv, ið verða vektað. |
| 6.4.2017 | 30 min. at stovna ein talgildan samleika. Hvat merkir tað? | - Kravið um 30 min. kemur frá øðrum londum, serliga í mun til kort. Endamálið er, at samleikin ikki skal bíleggjast, men verða tøkur hjá útvegaranum (RA-fólkinum) at útflyggja í samband við skráseting. |
| 6.4.2017 | Hvørji ítøkilig krøv eru til uppitíð/tilgængelighed? | - Loysning skal vera robust og veitarin skal definera eitt produktiónsmiljø sum livir upp til svartíðir og uppitíðir. Endaliga ábyrgdin fyri uppitíð er deild millum driftsveitaran og systemveitaran. Víst verður annars til avsnitt 3.1 í Skjali 2a, Needs Statement. |
| 6.4.2017 | Smb. sáttmálanum ger Gjaldstovan licens-avtalur beinleiðis við undirveitarar, men høvuðsveitarin skal garantera fyri samlaðu veitingini. Hvussu hongur hetta saman? | - Gjaldstovan vendir aftur við útgreinaðum svari |
| 6.4.2017 | Hvat merkir tað, at Gjaldstovan fyritrekkjur eina desentrala loysn, men letur upp fyri sentralari loysn? | - Sum Gjaldstovan lesur krøv í eIDAS og gennemførelsesforordning 2015/1502 viðv. "Sole control" av samleikanum, metir Gjaldstovan at privat key skal liggja desentralt hjá brúkaranum, fyri at hann hevur fult ræði á sínum samleika. Um veitarin metur at ein sentral loysn gevur sama "sole control", skal veitarin grundgeva fyri hesum.<br>- Gjaldstovan hevur ikki funnið signeringsloysnir sum eru reint desentralar. Heldur er tað ein kombinatión av desentralum og sentralum elementum.<br>- Gjaldstovan hevur funnið nógvar autentifikatiónsloysnir sum eru desentralar, m.a. FIDO Alliance baseraðar loysnir, umfatandi bæði viðv. brúkara-eindum og servara/back-end. |
| 6.4.2017 | Orðing um at veitarin er "den professionelle part" verður nýtt nakrar ferðir í sáttmálanum t.d. í punkt 9. s.6: "Da Leverandøren som | - Júst nevnda orðing er knýtt at Løsnings-verifikationsfasuni, og tankin er, at veitarin í hesi fasu sikrar, at øll neyðug/týðandi øki verða greinað.<br>Orðingin "den profesionelle part" skal generelt skiljast soleiðis, at tað er veitarin, ið hevur best innlit í loysnina |

| | | |
|---|---|---|
| | den professionelle part har kendskab til Løsningens funktionalitet, er det Leverandøren, der skal sikre, at nødvendige forhold afklares.<br><br>Hvussu skal hetta skiljast? | og tilhoyrandi funktionalitetir, sum veitarin býður inn við í sínum tilboði. Harvið kann Gjaldstovan, innan fyri rímilig mørk, vænta, at veitarin best kann greina týðandi øki og m.a. vísa á framtíðar váðar. |
| 6.4.2017 | Í avsnit 4.1 í fylgiskjali 2b stendur, at tað skal vera møguligt at síggja mun á einum borgara og einum starvsfólki. Undir 4.6.2 stendur at ein arbeiðsgevari skal hava møguleika geva og strika loyvir til eitt starvsfólk. Men í 5.1.2 stendur at Employer Mandate er undir 'Options'. Hvussu skal skiljast munur á hvat er kravt og hvat er optional? | - Útgangsstøðið er, at vit hava tvey sløg av identitetum: borgarar og starvsfólk. Tað kann verða ein arbeiðsgevari ella borgari, ynskir at hava hesi atskild, og tað merkir, at tú mást hava tveir identitetir. Um ynskt verður, at starvsfólka-identiteturin verður knýttur at privata borgara-identitetinum, so er tað at optiónin kemur inn í myndina, har vit lata upp fyri at tú kanst brúka tín borgaraidentitet í arbeiðshøpi (5.1.2, fylgiskjal 2a). Tað kann eisini verða, at ein borgari gevur einum øðrum borgara heimild at umboða seg, og hetta er lýst í fylgiskjali 2a, 5.1.1. |
| 6.4.2017 | Hvat er tykkara definitión av muninum millum 'Substantial' og 'High' tá tosa verður um Assurance level? | - Tað liggur lítil praksis á økinum, av tí at eIDAS er nýggj lóggáva (kom í gildi í juli 2016). Vit hava tí í stóran mun bert lógartekst at halda okkum til, sí eIDAS art.8 og Gennemførelsesforordning 2015/1502, serliga Skjal 1 punkt 2.2.1 er viðkomandi fyri veitaran.<br>- Um vit hyggja eftir krøvunum í útboðstilfarinum, so er tað eitt minstakrav, at loysnin sum minimum skal vera "Substantial".<br><br>Um so er, at loysnin er 'substantial', verður biðið um eina lýsing av hvussu hon evt. kann verða lyft til 'high'. Smb. serfrøðingum, Gjaldstovan hevur tosað við, er hetta í ávísan mun framvegis ein tulkingarspurningur, av tí at avmarkað praksis finst á økinum. Tí verður í tilboðinum eisini hugt eftir, um veitarin kann argumentera fyri, hvussu loysnin kann gerast high.<br><br>- Sí https://www.youtube.com/watch?v=ZXG2coszzyo (ljóðgóðskan er skiftandi). Hetta er ein tulking av LoA og útflýggjan av samleika.<br><br>- Spurningurin um substantial ella high er bæði relaterað til tøkni og prosess. Veitarin hevur ábyrgd av tí tøkniligu loysnini ísv. applikatiónir og tær eindir (t.d. Secure |

| | | |
|---|---|---|
| | | Elements), sum loysnin skal fevna um. Gjaldstovan hevur ábyrgd av tí organisatoriska partinum. |
| 6.4.2017 | Tað verður fleiri staðnar skriva '…followed by a signing' (td. Síðu 14) Undirskrift verður oftani brúkt til skjøl og onnur fysisk elementir. Men tit leggja upp til ymsar mannagongdir, sum skula undirskrivast. Skal tað skiljast sum at eitt log-entry skal hava ein hashvirðið klistra aftrat sær, ella skal mannagongdin enda út í einum skjalið, sum verður lagra í td. Mínboks ? | - Her er talan um at generera eitt hash, ikki at undirskriva eitt skjal. Tað skal tó vera møguligt at endurskapa hash virðið. Í hesum føri kundi tað verið teksturin sum verður vístur brúkaranum +tíðarstempul+navn ella líkn sum, saman við tí privata signeringslykilinum, verður til eitt hash virði.<br>Um eitt Salt ella Nonce virði skuldi verið nýtt í skapa hash-virði,so skal hetta goymast trygt og relaterast til signerininga – tí skal vera møguligt at endurskapa hash-virðið.<br>- Viðv. applikatiónunum í loysnini, so skal metast um pr. aktión í hvønn mun tað er neyðugt við hash-signaturi, ella um tað er nøktandi við re-autentifikatión. |
| 6.4.2017 | Hvat er tað, sum skal koyra sum ein CMS skipan ? Er tað Self-service skipanin ella hvat ? Ella er tað RA-brúkarafladurnar ? (NFK003) | - Allar brúkaravendar web applikatiónir kunnu byggjast við einum CMS. Um veitarin hevur góðar royndir við øðrum web development frameworks og kann argumentera fyri teimum so verður tað mett líka gott sum eitt CMS.<br>- Galdandi fyri allar brúkaravendar tænastur, tvs. allar útviklings-vendar uppgávur, t.e. web-applikatiónir – sjálvgreiðslumodulini, RA og support. |
| 6.4.2017 | Í útboðstilfarinum, verður nevnt fleiri ferðir at krav skal greinast nærri í agilu processini. Dømi: "Brúkarnir skal kunnu endurnýggja certifikatir".<br>Hetta kann vera trupult at ramma inn og seta ein prís á, og hvussu nógv tíð kann setast av. Hvussu sikra vit at processin gerst konstruktiv? | - Lagt verður upp til, at hetta verður lýst nærri í Løsningsverifikationsfasuni. Her mugu vit koma tættari inn á t.d. brúkaravinarligheit, og finna balancu um hvussu hetta best kann gerast.<br><br>- Tó væntar Gjaldstovan, at veitarin sum partur av tilboðnum kemur við uppskoti/tilmæli, hvussu tey ymisku krøvini í høvuðsheitum kunnu lúkast. |
| 6.4.2017 | Um man fer eftir einari sim loysn, so er eitt samstarv við televeitararnar sum FT og Vodafone neyðugt. Ótti kann vera fyri, at FT hevur eina interessekonflikt her, annaðhvørt um FT letur inn tilboð ella sum eigari av KT-fyritøku, ið møguliga letur inn tilboð. | - Gjaldstovan vendir aftur við útgreinaðum svari |
| 6.4.2017 | OPT001: Citizens shall have two ways of presenting digital identification information: with a smartphone app and in a | - Grundleggjandi upplýsningar sum kunnu eyðmerkja teg sum persón t.d. navn, adressa og mynd.<br>- Brúkarin skal kunna stýra, hvørjum tað skal vísast fyri. Eitt tonkt scenarie kundi verið í samband við útflýggjan av heilivági á apotekinum. |

| | | |
|---|---|---|
| | browser.<br>- Which information will be presented (shown) and to whom? | |
| 6.4.2017 | OPT002: Citizens shall use the Solution Core authentication mechanism in order to access the digital identification information.<br>- Is this requirement to be understood as 'authentication' of user to a service? Or user authenticates and can then have access to personal digital information? | - Skal skiljast sum: "user authenticates and can then have access to personal digital information". |
| 6.4.2017 | OPT003: The digital identification solution shall contain citizen physical information.<br>- Please clarify the source and use of this information and especially the use of picture | - Upplýsingarnir skulu liggja í TS- loysnini (um optiónin verður keypt). Myndin skal nýtast til at eyðmerkja persónin. |
| 6.4.2017 | OPT029: TS users should be able to use their signature without first authenticating.<br>- It is understood that the Document Signing solution (external solution for electronic document signature) would be responsible this and that the TS/IDP would not manage user authentication in this type of usage. | - This is not directly related to the document signing (WYSIWYS) subject, as there is a functional requirement (FK096) for this as well. It is a functionality to use the QSCD on itself, without having to authenticate first. If the signature and authentication user-gestures are different in the proposed solution, then only the signature gesture is used in this use case. IdP information is necessary in order to ascertain the identity of the signer. Gjaldstovan will rate K-requirements' significance on a scale from 1-10 (lowest to highest). This requirement and option will be rated as a 1. |
| 6.4.2017 | OPT031: Delegation of Mandate<br>- Who will provide the solution for managing mandates as it is not in the RFP scope? It is an external system, correct? Is it already in place or would be made available later? | - The vendor (and possible sub-vendor) is responsible for this entire option, including the mandate management (sub)application within the self-service application, where there must be functionality to delegate and withdraw mandates |